Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og samfelagsdeildin
Department of History and Social Sciences

# Skeiðslýsing *Course description* — Vár 2024

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 6126.23 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Granskingaretikkur í smásamfeløgum: Relatiónir og refleksivitetur<br><br>Research ethics in small societies: Relations and reflexivity |
| **ECTS** | 2 |
| **Fortreytir**<br><br>***Prerequisites*** | Ph.d.-lesandi og tey, sum hava ætlanir um ella eru farin undir at fyrireika eina ph.d.-verkætlan í samfelagsvísindum, heilsuvísindum, hugvísindum ella kvalitativa gransking í øðrum vísindagreinum. Lesandi skulu hava lokið masternám. Lesandi skulu skriva eina uppgávu við reflektiónum um etisk viðurskifti í egnum granskingarverkætlanum áðrenn skeiðið byrjar.<br><br>PhD students and those who are planning or preparing a PhD project in social sciences, health sciences, the humanities, or a qualitative research project in other sciences. Students must have completed a master’s degree. Students shall write an assignment concerning ethics in their research project prior to course commencement. |
| **Stig**<br>***Level*** | ph.d.<br><br>PhD |
| **Endamál** | Í einum smásamfelagi eru etiskt týðandi støður ofta av einum øðrvísi slagi enn í nógvum stórsamfeløgum. Endamálið við skeiðinum er tí, at lesandi menna tilvit um etiskt týðandi støður og eisini førleikar at meta um tílíkar støður. Við einum støðuetikki skulu lesandi gera etiskar metingar í einum konteksti, har granskingarstøðan er fatað sum verandi ein partur av heildini av samansettum normum. Ein refleksivur etikkur krevur tí, at lesandi taka hædd fyri smásamfelagsviðurskifti, her serliga tá talan er um tøtt ella fleirsambond. Hetta skulu lesandi vera før fyri at taka atlit til ígjøgnum alla granskingartilgongdina m.a. við atgongd til granskingarfelt, at tryggja áhaldandi samtykki, innsavnan av tilfari, trúnað, at verja luttakarar, viðgerð og miðling av úrslitum og valdsstøður, sum kunnu standast í allari tilgongdini. |

| | |
|---|---|
| ***Purpose*** | In small societies, ethically important moments are often different compared to larger societies. The purpose of the course, therefore, is for students to develop a consciousness of ethically important moments and the skills to assess such situations. Using situational ethics, students will make ethical assessments in which the research situation must be understood as being segments of a complex whole of norms. Consequently, reflexive ethics demands that students take into account the circumstances of small communities, especially with respect to close relations and multiple relations. Students must be competent to take into account throughout the entire research process. This includes access to the research field, ensuring ongoing consent, data collection, confidentiality, protecting participants, analysis and communication of results, and power situations, which can emerge throughout the entire process. |
| **Innihald**<br><br>***Content*** | Skeiðið fevnir um hesi høvuðsevni:<br>• Mannagongdsetikkur og støðuetikkur<br>• Tættar relatiónir í smásamfelagnum<br>• Valdsstøður og útsettir bólkar<br>• Áhaldandi samtykki<br>• Trúnað og anonymitet í smásamfelagnum<br>• Positionalitet<br>• Tøgn í smásamfelagnum<br>• Reflektiónir um miðling av úrslitum<br><br>The course comprises the following main topics:<br>• Procedural ethics and situational ethics<br>• Close relations in small communities<br>• Power situations and marginalised groups<br>• Ongoing consent<br>• Confidentiality and anonymity in small communities<br>• Positionality<br>• Silence in small communities<br>• Reflections on communication of results |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Skeiðið er skipað við fyrilestrum, kjaki og sum verkstovu. Luttakarar skulu lata inn eina uppgávu við reflektiónum um etisk viðurskifti í egnum granskingarverkætlanum, áðrenn skeiðið byrjar.<br><br>The course consists of lectures, discussion, and workshops. Participants must submit an assignment with reflections of ethical issues in their own research projects prior to course commencement. |

| | |
|---|---|
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Tá skeiðið er lokið, skal tann lesandi verður før/-ur fyri at:<br>• lýsa munin í millum mannagongdsetikk og støðuetikk, og hvussu hesi gera seg galdandi í eitt nú rekrutering av luttakarum, atgongd til feltið, og viðgerð og miðling av dáta.<br>• eyðmerkja etiskt týðandi (tví)støður og meta um møguleikar fyri váðar ella skaða (m.a. sosial og sálarfrøðilig) hjá luttakarum og øðrum, sum kunnu verða rakt.<br>• sniðgeva og/ella tillaga eina granskingarverkætlan, sum tekur hædd fyri etiskum avbjóðingum, sum serliga kunnu gera seg galdandi í smásamfeløgum.<br>• kjakast og leggja fram um granskingaretiskar støður og positionalitet.<br>• meta um, hvussu samtykki og trúnað, sum kunnu vera øðrvísi í einum smásamfelagi, áhaldandi verða tryggjað.<br>• kjakast um vald í granskingarrelatiónum og hvussu ein sum granskari arbeiðir tilvitað í tílíkum relatiónum, serliga tá talan er um útsettir og lágvaldsbólkar.<br><br>On completion of the course, students can demonstrate ability to:<br>• describe the difference between procedural ethics and situational ethics and how these are relevant in e.g. participant recruitment, access to the field, and analysis and presentation of data.<br>• Identify ethically important moments/dilemmas and assess the potential for risk or harm (incl. social and psychological) to participants or others, who can be implicated.<br>• design and/or modify a research project, which takes account of ethical challenges, that can be especially evident in small communities.<br>• discuss and present on research ethics situations and positionality.<br>• assess how consent and confidentiality, which can differ in a small society, is continually assured.<br>• discuss power in research relations and how researchers can consciously work in such relations, especially with respect for marginalized or low power groups. |
| **Próvtøkuháttur**<br><br>***Assessment method*** | Reflektiónsuppgáva, virkin luttøka (100% uppmøting, luttaka í bólkaarbeiði á skeiðinum) og munnlig framløga av reflektiónsuppgávu.<br><br>Reflective assignment, active participation (100% attendance, participation in group work during the course) and oral presentation of assignment. |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Innanhýsis<br><br>Internal examination |
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | Staðið / ikki staðið<br><br>Pass / Fail |
| **Lestrarlisti**<br>***Bibliography*** | Bókmentalisti verður útflýggjaður, áðrenn skeiðið byrjar. |

| | |
|---|---|
| | Bibliography will be made available prior to course commencement. |
| **Ábyrgd**<br>***Contact*** | Erika Anne Hayfield og Anna Sofía Fjallheim |